FS Vágar-EB/Streymur 1-1 (0-0):

Alt er framvegis opið

Samansettu liðini býttu stigini sína-millum, og sostatt er alt enn púrasta opið í bólki 2

LØGMANSSTEYPIÐ
Jákup Mørk

Vágamenn skoraðu móti dystarenda, men máttu kortini siggja gestirnar fara av aftur oynni við øðrum stiginum

Mynd: Edvard Joensen

Undan dystinum var mest sum greitt, at ein møguligur vinnari av dystinum kom at standa við sera góðum kortum í hondini undan seinasta umfarinum í bólkaspælinum.

Saman við TB høvdu bæði vágamenn og EB/-Streymur fýra stig fyri fýra dystir, og tí kundi ein sigur til annan partin væl gerast avgerandi fyri, hvat av liðunum skuldi koma víðari í fjórðingsfinaluna.

Sleptu takinum

Í fyrra hálvleiki var tó lítið, sum bendi á, at nakar av þortunum ætlaði sær at vinna. Úr Vágunum frættist, at spælið als ikki var nakað at reypa av fyrstu trý korterini, og at tað var rættiliga langt ímillum løturnar, sum fingu hjartað hjá áskoðarunum at sláa nøkur eyka sløg.

Í seinna hálvleiki kom tó alt fyri eitt vend í. Vágamenn høvdu uttan iva fingið av at vita frá venjaranum, og frá fyrsta bríksli royndu teir nú at trýsta mótstøðumenninar langt aftur á vøllin.

Gestirnir royndu hinvegin í mestan mun at binda fyri, soleiðis at í øllum førum annað stigið kundi fáast av aftur oynni, og sum vera man, so viðførdi hetta, at eitt munandi trýst varð lagt oman móti málinum hjá EB/Streymi.

Leingi bendi tað tó tann vegin, at tað skuldi eydnast gestunum at verja seg til ein málleysan javnleik, tí hóast trýst og møguleikar, so tóktust teir á heimaliðnum at hava meira enn striltið við at vinna seg fram til málmøguleikar. Ikki fyrr enn ungi Jákup Joensen heilt fram móti dystarenda hevði snikt seg framvið, bar til, og við bert heilt fáum minuttum eftir, tóktist sigurin nú vísur.

EB/Streymur hevði neyvan ætlað, at tað skuldi gerast somikið knapt, nú vágamenn høvdu skorað, men nú svaraðu teir brádliga aftur. Heimamenninir høvdu eisini nýtt nógva orku fyri at halda trýstinum, og nú fullu teir langt aftur á vøllin.

Tíðin var tó um at renna undan hjá gestunum, men í yvirtíðini hjá dómaranum kundi Andrzej Pacek javna, soleiðis at 1-1 gjørdist endaliga úrslitið.

Púrasta opið

Hetta inniber, at tað framvegis er púrasta opið, hvat av liðunum skal fylgja GÍ í fjórðingsfinaluna. Á pappírinum stendur helst ringast til hjá EB/Streymi, sum í seinasta dystinum skal takast við GÍ á útivølli.

Hini bæði fara at dystast sínamillum á Tvøroyri. Her hevur FS Vágar helst betra útgangsstøðið, tí teir hava vunnið fyrru uppgerðina móti TB, og kunnu tí kanska standa seg við javnleiki. Men tað er tó ikki víst, at hetta verður nóg mikið, tí EB/Streymur er tað av teimum trimum niðastu liðunum, sum samanlagt hevur staðið seg best í innanhýsis dystunum, so verður talan aftur um tveir javnleikir komandi vikuskiftið, verða tað teir, sum koma víðari, so alt í alt er alt framvegis púrasta opið í bólkinum.

Dysturin í tølum

FS Vágar-EB/Streymur 1-1 (0-0)
1-0: Jákup Joensen
1-1: Andrzej Pacek

Málskjúttar løgmanssteypið

Andrew á Fløtum	HB	6
Jens Kristian Hansen	B36	4
John Petersen	B36	4
Fróði Benjaminsen	B68	4
Uni Arge	HB	4
Øssur Hansen	B68	3
Jens Erik Rasmussen	FSV	3
Bartal Eliasen	GÍ	3
Súni Fríði Johannesen	GÍ	3
Heðin á Lakjuni	KÍ	3
Jónstein Petersen	NSÍ	3
Alexander Radosavljevic	TB	3
Nenad Zivanovic	VB	3
Din Sandu	B36	2
Fróði Clementsen	B36	2
Marni Djurhuus	EB/Streymur	2
Sámal Joensen	GÍ	2
Jón Rói Jacobsen	HB	2
Kurt Mørkøre	KÍ	2
Ove Nysted	KÍ	2
Óli Hansen	NSÍ	2
Sonni L. Petersen	NSÍ	2
Jonhard Frederiksberg	Skála	2
Bárður Dimon	TB	2
Zoran Mancic	TB	2
Jón Pauli Olsen	VB	2
Palli Augustinussen	VB	2
Robert Cieslewicz	VB	2

B68-Skála 1-4 (1-3):

B68 setti Skála uppá pláss

Við hjálp frá vindinum í fyrra hálvleiki legði B68 trýst á frá byrjan, og trýstið helt á mestsum allan dystin. Stóri maðurin hjá B68 var Anders Nygaard sum skoraði 3 ferðir

LØGMANSSTEYPIÐ
Bjartur Nolsøe

Eftir at Skála hevði vunnið í Klaksvík seinasta vikuskiftið, var spenningur undan dystinum. Skála kundi við at vinna móti B68, tryggja sær víðari luttøku í steypakappingini. B68 skuldi hinvegin helst vinna dystin um teir skuldu víðari.

B68 trýsti

Fitt av vindi var á Skála leygardagin, og darvaði hetta eisini spælinum. B68 hevði vindin í ryggin fyrra hálvleik, og fingu teir lagt eitt trýst á Skála frá byrjan.

Hóast nógva vindin, gjørdu bæði liðini tað sum frægast var, nevniliga at halda bóltinum niðri. Serliga B68 megnaði at fáa spælið at koyra. Málmøguleikarnir teir komu fram til vóru ikki tilvildarligir, men góð gjøgnumspæld álop.

Tað var serliga í vinstra síðu at B68 kom ígjøgnum og fekk lagt innfyri.

Skálamenn lógu fyri tað mesta aftarlaga á vøllinum og lúrdu uppá kontra. Tær ferðirnar teir royndu seg við uppspæli, blivu teir sum oftast steðgaðir, áðrenn teir komu inn í brotsteigin hjá B68.

Tað vóru bert spældir 7 minuttir tá fyrsta málið kom. Øssur Hansen fær bóltin í vinstru síðu og spælir innfyri, har Anders Nygaard setti fótin á. Eitt einkult, men vakurt mál.

Tá 11 minuttir eru farnir kemur B68 uppá 2-0. Aftur er tað uppspæl í vinstru síðu, bólturin endar hjá Jan Inga Petersen, sum spælir Anders Nygaard frían.

Nú væntaðu flest øll at Skála fekk trupult at koma við aftur í dystin. Higartil høvdu teir ikki havt nakra veruliga roynd uppá málið hjá B68.

Og tað var eisini B68 sum hevði greiða yvirvág næstu løtuna. Teir komu fram til fleiri góðar málmøguleikar, men antin skotu teir við síðuna av, ella bjargaði málmaðurin hjá Skála. Verjan hjá Skála var eisini ótrygg hesa løtuna. Ofta hendi tað seg at teir løgdu aftur til málmannin og bólturin fór út til horna. Eisini hevði verjan ilt við at meta um høgar bóltar sum í vindinum duttu niður á tann váta vøllin.

Skála við aftur

Hóast tað sá svart út, eydnaðist tað Skála at koma inn aftur í dystin. Bólturin verður spældur inn í B68-brotsteigin. Tað sá út til at verjan hevði tamarhald á støðuni, men ein misskiljing endar við at Marius Joensen gerst fríur, og kann minka um munin fyri Skála til 1-2. Hetta var miðskeiðis í fyrra hálvleiki.

Løtu seinni kundi Skála javna um teir vóru meira neyvir í skotroyndini. Jonhard Frederiksberg kemur at standa væl fyri í brotsteiginum, men málmaðurin hjá B68 bjargar.

Skálamenn trúðu nú uppá, at teir kundu fáa okkurt burturúr dystinum. Men 10 minuttir áðrenn hálvleik, er tað aftur B68 sum spælir upp í vinstru síðu og innfyri, har Anders Nygaard aftur stendur væl fyri. Hann setur høvdið á, og bólturin hevur kós við síðuna av málinum, men rakar ein Skálamann so hann fór í málið til 1-3.

Avgerðin fellur

Seinni hálvleikur var ikki meira enn 3 minuttir gamal, tá Anders Nygaard aftur slapp leysur. Hesuferð bleiv bólturin spældur ígjøgnum mitt fyri, og danin skeyt framvið málmanninum hjá Skála til 4-1.

Tá so Skála fekk Paula Hansen útvístan eftir 15 minuttir í seinna hálvleiki, varð dysturin í roynd og veru avgjørdur.

Eftir hetta dovnaði spælið, og meginparturin gekk fyri seg uttan fyri brotsteigin hjá Skála. Hetta var eisini væntandi, nú B68 spældi við einum mann meiri.

B68 kom eisini fram til stórar málmøguleikar, sum kundu givið fleiri mál. Skála hevði hendinga skotroyndir úti frá, uttan at hetta gjørdist vandamikið. Soleiðis gekk restin av dystinum, og komu tískil ikki fleiri mál.

B68 var betra liðið og vann uppiborið. Bæði liðini vístu, at sjálvt um veðrið ikki var av tí besta, ber til at fáa spælið at koyra, í staðin fyri at royna seg við longum og høgum bóltum.

B68 vann tryggan sigur, tá teir leygardagin ferðaðust tvørtur um fjørðin

Mynd: Jonhard Hammer

Dysturin í tølum

Skála-B68 1-4 (1-3)
0-1: Anders Nygaard
0-2: Anders Nygaard
1-2: Marius Joensen
1-3: Sjálvmál
1-4: Anders Nygaard

Todi er á meistarakós

Nú er munurin millum FCK og Brøndby so lítil, at tað er upp til FCK sjálvt at gera av, um teir skulu endurvinna meistaraskapin

SUPERLIGAN
Jóannes Hansen

Tá superligan var í vetrarfrí, tóktist tað púra ógjørligt. Nú resta seks umfør av hesum kappingarárinum, og sunnudagin gjørdist tað veruleiki. Eftir enn eitt Brøndby tap og enn ein FCK sigur er munurin millum fyrr so sannførandi oddaliðið og liðið hjá Toda Jónsson minkaður til tvey stig.

Tað vil við øðrum orðum siga, at um FCK vinnur teir seks dystirnar, sum eru eftir, so fara teir at endurvinna meistaraskapin, sum teir vunnu fyri einum knøppum ári síðani. Soleiðis sum tað sær út í løtuni, so verður dysturin í Parkini millum FCK og Brøndby – tað er tann dystin, sum Atlantic Airways og Sosialurin skipa fyri ferð til – ein sonn finala um DM.

Tølini siga, at FCK er væl fyri. Síðani vetrarsteðgin hava teir ikki tapt. Teir hava vunnið seks dystir, og tvær ferðir hevur verið javnleikur. Málmunurin er 19–1!

FCK er nú bert tvey stig aftan fyri oddaliðið, Brøndby, og sita sostatt sjálvir við avgerðini um, hvør verður danskur meistari hetta kappingarárið

Todi skoraði

Hesa ferð var setningurin hjá FCK á pappírinum léttari, enn hann hevur verið í øllum hinum dystunum síðani vetrarsteðgin. Todi og liðfelagarnir vóru á gamla heimavøllinum hjá Toda og fleiri av hinum spælarunum í FCK.

Áhugin fyri dystinum í Lyngby var stórur. Í vár hevur áskoðarratalið har verið niðanfyri eitt túsund. Hesa ferð møttu 5.393. Tað gekk so mikið seint at avgreiða atgongugjaldið, at tey síðstu komu ikki inn, fyrr enn 1. hálvleikur var hálvrunnin.

Lyngby hevur tapt allar dystirnar í vár, og teir løgdu aftur sunnudagin rygg til eitt tap. Men tað gjørdist ongantíð nakað stórt upplivilsi av einum fótbóltsdysti. FCK gjørdi sína skyldu og ikki meiri enn tað. Teir vunnu 3–0. Tað er bara Vejle, sum hevur vunnið við so lítlum muni ímóti Lyngby í vár, sum FCK gjørdi sunnudagin.

Todi Jónsson hevur ikki skorað í fleiri teimum seinastu dystunum. Men hesa ferð eydnaðist tað. Hann legði FCK á odda, tá 19 minuttir vóru farnir. Hini bæði FCK málini skoraði miðvallarspælarin Thomas Røll í 26. og í 66. minutti.

Tá tað restaðu níggju minuttir, varð Todi skiftur út. Álopsfelagin hjá honum, Zuma, var ikki á liðnum hesa ferð. Hann segðist vera smáskaddur. Í staðin spældi Peter Møller. Sambært donsku fjølmiðlunum gekk einki serligt hjá honum, og hann varð skiftur út í 72. minutti.

Álopsspælararnir hjá FCK skulu støðugt vísa, hvør dugur er í teimum. Í løtuni kannar felagið, um tað ber til at keypa ein spælara, sum kann vera við í kappingini um fremstu plássini. Í norskum bleðum ljóðar, at FCK hevur boðið tíggju milliónir fyri 24 ára gamla Thorstein Helstad. Hann hevur spælt 54 dystir fyri Brann Bergen, og hann hevur skorað 39 mál. Eitt umboð fyri felagið váttar, at teir samráddust við FCK hósdagin, men eingin sáttmáli er undirskrivaður. Og tað er ikki víst, at talan verður um nakran sáttmála við FCK. Eysturríksska Austria Wien er eisini framvið.

Brøndby kiksaði aftur

Eingin endi tykist vera á, hvussu illa tað gongst hjá Brøndby. Í heyst vóru teir í serflokki í superliguni. Nú hava teir ferð eftir ferð mist stig á heimavøllu. Sunnudagin høvdu teir vitjan av FCMidtjylland. Og tað gekk, sum tað hevur gjørt fleiri tær seinastu ferðirnar. Brøndby tapti, og harvið høvdu teir innanfyri átta dagar mist sjey stig.

FCM kom á odda 2–0, tá tað restaðu tólv minuttir. Tað eydnaðist Brøndby at minka um munin, tá tað vóru fimm minuttir eftir. So var lagt upp til, at tað skuldi ganga, sum tað gjørdi, tá AGF næstseinasta sunnudag var í Brøndby. Tá javnaði heimaliðið til 2–2 í yvirtíðini.

Men hesa ferð eydnaðist tað ikki at javna. Brøndby venjarin ásannaði, at liðið er í aldudali, og spælararnir tagdu. Fjølmiðlarnir liggja alla tíðina framvið fyri at fáa spælararnar at siga okkurt, sum kann brúkast at seta innanhýsis kílar í. Tí er best einki at siga.

Tað er ikki ómøguligt, at FCK longu komandi sunnudag verður oddalið í superliguni. Tá skal FCK spæla á heimavølli ímóti Silkeborg. Á pappírinum verður uppgávan hjá Brøndby torførari, tí teir skulu til Aalborg.

Óli aftur í miðdeplinum

Hvidovre vann, og mótstøðuliðið var síðsta tíman undirmannað, tí ein hevði fingið reyða kortið fyri at gera seg inn á føroyska landsliðsmannin

1. DEILD DANMARK
Jóannes Hansen

Síðani Peter Schmeichel boðaði frá, at hann fór at taka seg aftur úr Hvidovre, hevur tað hilnast betri hjá Óla Johannesen og teimum, enn tað gjørdi frammanundan. Spurningurin er so, um gongdin fer at verða tann sama hjá Aston Villa, nú Schmeichel er rýmdur til Manchester City og Kevin Keegan!

Hesa ferð hevði Hvidovre vitjan av Skive, og heimaliðið vann 3–0. Teir fingu øll málini í 1. hálvleiki, og teir kundu havt vunnið uppaftur meiri, um teir høvdu fingið úrtøku burturúr møguleikunum, sum teir høvdu í 2. hálvleiki.

At Hvidovre hevði lætt spæl komst m. a. av, at mótstøðuliðið var undirmannað síðsta tíman. Ein hálvur tími var farin, tá ein av Skive monnunum, Peter Bechmann, fekk reyða kortið. Hann varð vístur av vøllinum, tí hann hevði gjørt seg inn á Óla Johannesen.

Í síðstu viku ljóðaði í donsku pressuni, at venjarin hjá Hvidovre, Jan Sørensen, er á veg úr felagnum. Hann verður nevndur sum møguligur venjari í AGF eftir summarfrítíðina, og hann váttar, at tað hevur verið samband millum partarnar. Venjarin er sera væl nøgdur við Óla Johannesen. Spurningurin er so, um hann vil hava føroyska verjuspælaran við sær til Århus. Tað hevði nú verið ein eitt sindur undarlig støða. Óli fekk ikki nógvar møguleikar at vísa, hvør dugur var í honum sum miðverji, tá hann flutti av Tvøroyri og til Århus, har hann í AGF royndi, hvussu langt fótbóltsevnini kundu bera!

Stórsigur til Randers

Køge er framvegis oddalið í næstbestu donsku deildini. Hesa ferð vóru teir aftanfyri 1–0 á útivølli í Odense ímóti B1909, men teir vendu gongdini og vunnu 3–1.

Farum er framvegis omanfyri uppflytingarstrikuna. Hesa ferð hevdu teir vitjan av Fredericia, sum Johan B. Hansen spælir við. Úrslitið var 2–1 til heimaliðið.

HFK Sønderjylland flutti niður í fjør, og teir vilja fegnir uppaftur beinanvegin. Teir eru við í stríðnum um tey fremstu plássini, men leygardagin fingu teir ein orduligan undir vangan. Teir vóru í Randers, og heimaliðið vann við ikki minni enn 8–0! HFK misti ein mann, tá eitt korter var farið, og í 56. minutti mistu teir ein afturat.

I evstu løtu

Klokkan var farin av teimum 90 minuttunum, tá Zwolle tryggjaði sær trý stig um vikuskiftið

HOLLAND
Jákup Mørk

Zwolle hevði um vikuskiftið møguleika at styrkja um oddastøðuna á næst bestu hollendsku deildini, tá teir á útivølli skuldu royna seg móti TOP/Oss, sum er fullkomuliga avbyrgt á niðasta plássinum í deildini.

Á pappírinum skuldi talan soleiðis verið um eina yvirkomuliga uppgávu hjá felagnum hjá Súna Olsen, men tað skuldi tó vísa seg, at gerast alt annað enn lætt.

Tvær ferðir hevði Zwolle lagt seg á odda, men í báðum førum eydnaðist botnliðinum at svara aftur, og tá 90 vóru farnir, var støðan framvegis javnleikur.

Sum tað sømir seg einum oddaliðið, so hevði Zwolle tó tað petti av hepni, sum skal til, um tú skalt gera teg galdandi í oddinum. Í yvirtíðini eydnaðist tað nevnliga at tryggja sigurin, tá Arne Slot brádliga fekk møguleikan, og sostatt heldur Zwolle framvegis fast um oddasessin.

Tað eydnaðist tó ikki Zwolle at økja um munin niður til næstbesta liðið, tí bæði RBC og Excelsoir vunnu sínar dystir, so munurin er framvegis lítil.

Komandi vikuskifti hevur Zwolle aftur útivøll. Teir skulu tá spæla móti Helmond.

Julian við aftur

Fyri fyrstu ferð undir leðsluni hjá Jan Mølby, var Julian Johnsson á vøllinum, tá Hull um vikuskiftið spældi javnleik móti Bristol Rovers.

Hull legði seg á odda í fyrra hálvleiki, og undan steðginum høvdu teir eisini fleiri møguleikar at økja um leiðsluna, uttan at hetta tó gav nakað av sær.

Í ensku miðlunum verður sagt, at Bristol Rovers vóru greitt við undirlutan, men tað eydnaðist teimum tó at fáa annað stigið, tá teir miðskeiðis í seinna hálvleiki fingu seinasta málið í dystinum.

Úrslitið kundi hvørgin parturin tó nýta til nakað sum helst. Bert eitt umfar er eftir í Bretlandi, og Hull – sum eitt langt skifti stríddist fyri uppflyting – kann í besta føri stríða seg upp á eitt 10. pláss í deildini.

-jm